

*Kristoffur Mørkøre er framleiðari av hesi nýggi fløguni, sum kemur í mars mánaði. Umframt hetta, so skal hann m.a. eisini spæla bassin*

Hetta eru sangir, sum snúgva seg um kjarnina í kristinlívinum – Golgata, viðurskifti okkara við Gud og náði hansara.

Sum dømi um hesar sangir, og sum eisini verða við á nýggju fløguni nevnir Eyðun hesar: Ein undurkelda man líða; Jesus, halt meg við tín kross; Um friður sum flóðin og Tá ið son sín Gud skal senda.

Á fløguni verða 9 sangir av eldri og yngri uppruna, eins og tríggir heilt nýggir, sum Eyðun eigur sín lut í.

Tann eina sangin hevur hann gjørt bæði orð og lag til. Ein annan sang eigur hann lagið til, meðan Sámal á Toftini eigur orðini, og triðja av hesum sangum hevur dóttir Eyðun, Kristina gjørt bæði orð og lag til. Saman við hinum báðum systrum sínum, Heidi og Birgit luttaka tær allar somuleiðis á fløguni.

Hesin sangurin hjá Kristinu verður samstundis tittullagið á fløguni: Eg eigi ein vin!

### Gamalt hugskot

Tað tekur altíð sína tíð at geva út eina slíka fløg, tí langt er frá hugskoti til veruleika.

Henda veruleika kann Eyðun eisini skriva undir uppá.

– Hugskotið til hesa fløguna byrjaði at koma fram fyri einum ári síðani.

– Men ikki fyrrenn mikudagin fóru vit av álvara undir sjálvar upptøkurnar til hesa fløguna. So tú kanst ætla, at eg eri spentur til fløgan skal koma út, sigur Eyðun.

# Tónleikurin skal vera í lagi

**Kendi svenski trummuspælarin, Claes Anderhell leggur tónlistarliga botnin á nýggju fløguna**

FLØGA

Gongur sum Eyðun og framleiðarin Kristoffur Mørkøre ætla, so skal fløgan koma á føroyska marknaðin um tveir mánaðir.

Fyri Eyðun er tað av stórum týdningi at orðini eru góð og sigandi; at teir umsettu sangirnir eisini halda mát, og at løgini skulu vera góð og byggja upp undir sjálvan tekstin.

Hinvegin – sum tónleikari, so veit hann eisini at tónleikurin hevur stóran týdning fyri eina fløgu. Og tí ætlar hann ikki at her skal slakast upp á krøvini á nakran hátt.

### Kend nøvn

Fyri at tryggja sær ein góðan botn í fløguna – bæði praktiskt og ikki minst tónlistarliga – so hevur hann fingið fatur á einum av allarfremstu trummuspælarunum í Svøríki, fyri ikki at siga í Norðurlondum.

Talan er her um svian Claes Anderhell, sum er freelanse tónleikari, og sum hevur spælt saman við teimum kendastu nøvnunum innan norðurlendskan tónleik.

Hann hevur m.a. spælt saman við svensku bólkunum Jerusalem og Vikingarna, og hevur spælt nógv saman við Svend Ingvards. Hann hevur somuleiðis spælt trummur saman við Carolu, Lill Lindfors og Hanne Boel, bara fyri at nevna nakrar av kendu norðurlendsku sangfuglunum.

Fyrr í vikuni kom hann so til Føroyar har hann skal spæla trummur á fløguni hjá Eyðun. Hetta er samstundis fyrsta ferðin, hann er her í landinum, men kanska ikki tann seinasta.

Claes verður liðugur við sínar upptøkur í dag, og í næstu viku skal so bassurin spælast inn.

Síðani verður restin av tónleikinum og sangurin tikin upp, og í mars mánaði fáa vit so høvið at hoyra sangin, tónleikin og framleiðsluna savnaða á fløguni "Eg eigi ein vin".



*Claes Anderhell er kendur trummuspælari. Ætlanin var upprunaliga, at upptøkur hansara skuldu gerast í Svøríki. Men tá hann fekk fyrispurningin um at koma til Føroyar var eingin ivi: Hóast hann hevur nógv at gera, so var gjørligt hjá Claes at seta nakrar dagar av til at koma higar*